# Ófriðurin merkist kring alt Ísrael

*- Vit royna at halda okkum burtur frá øllum ófriði, sigur føroyska Ann-Britt Schiller Israeli, sum saman við familju síni vitjar í Ísrael, har fólk kring alt landið stúra fyri, at blóðuga stríðið endar við veruligum kríggi*

EYÐUN KLAKSTEIN

Ógvusliga stríðið millum ísraelar og palestinar hevur tveitt ein myrkan skugga yvir ferðina hjá Ann-Britt Schiller Israeli og hennara familju til heimlandið hjá manninum.

Við sær hava Ann-Britt og maðurin Ronen allar tríggjar døturnar hjá sær, og óttin fyri ófriði og stríði hevur fingið familjuna at broyta ætlan fyri ferðina.

– Vit ætlaðu okkum at ferðast runt í Ísrael til skyldfólk, sum maðurin hevur ymsastaðni, men vit stúra so nógv fyri ófriðinum, at vit í løtuni halda okkum í Tel Aviv, her tað er friðarligt, sigur Ann-Britt.

- Men sjálvt um tað er friðarligt her, sum vit eru, so er ófriður á fólki, og tey stúra fyri, at veruligt kríggj skal bresta á. Fólk eru alla tíðina stand-by, og tey fylgja væl við tíðindunum í fjølmiðlunum.

**Á markinum til kríggj**

Umfatandi ófriður hevur seinastu vikurnar verið í sjálvstýrandi økjunum hjá palestinum, og hetta hevur eisini havt við sær eina sera spenta støðu í Ísrael.

Nógv fólk hava latið lív seinastu vikurnar, og enn fleiri hava fingið skaða í samanbrestunum millum herfólk hjá ísraelum og palestinar.

Ófriðurin hevur verið á markinum til veruligt kríggj, og í løtuni fer fram eitt umfatandi diplomatiskt virksemi fyri at fáa frið í lag og gongd á aftur friðartilgongdina í økinum, men hetta vísir seg at vera trupult.

Herdeildir og stríðsvognar hjá Ísrael standa til reiðar við sjálvstýrandi palestinsku økini, og hóast ein lítil skái tykist hava verið í stríðnum farnu dagarnar, kann blóðuga stríðið bresta á aftur nær tað skal vera.

**Steina eftir bilum og bussum**

Ann-Britt og Ronen hava búð í Silkeborg farnu fimm árini, men tey hava tikið farloyvi í tríggjar mánaðir fyri at fara til Ísrael at vitja familjuna hjá manninum.

– Vit komu higar fyri fýra vikum síðani og rendu okkum so at siga beint í ófriðin, tí tað gingu bara nakrir fáir dagar til stríðið brast á. Tað er serliga í tí palestinska økinum, at stríð er, men tað er eisini ófriðarligt í arabiskum býarpørtum í Ísrael, og tað merkir gerandisdagin her, sigur Ann-Britt.

– Vit eru í grundini komin til Ísraels fyri at lata genturnar uppliva landið og at lata familjuna hjá manninum síggja børnini. Tí er tað sera óheppið, at vit enda beint í einum ógvusligum ófriði.

Tær tríggjar genturnar eru fýra, sjey og níggju ára gamlar.

– Ein dagin, tá vit skuldu á ein marknað í Tel Aviv, koyrdi bussurin stóran umveg fyri at sleppa undan at koyra ígjøgnum ein arabiskan býarpart, har vandin allatíðina er fyri, at fólk steina eftir bilum og bussum. Við hvørt avlýsa bussar eisini túrar, so fólk merkja, at tað er ófriður í landinum, greiðir Ann-Britt frá.

**Avlýstu ferð norður í landi**

Ann-Britt og maðurin ætlaðu sær at vitja familju ymsastaðni í Ísrael, men í løtuni letur hetta seg ikki gera.

– Vit skuldu millum annað vitja eitt systkinabarn hjá Ronen, sum býr millum Jerusalem og Jeriko, men hann ringdi til okkum og mælti okkum frá at koma har, tí steinar, sum arabar høvdu tveitt eftir fólki og bilum, sløddust allastaðni.

– Skulu vit norður í landið, skulu vit koyra ígjøgnum arabiskar býarpartar, og tað kenna vit okkum ikki trygg við at gera. Vit royna at halda okkum burtur frá øllum ófriði.

– Vit hava tí valt at steðga á í Tel Aviv, her vit kenna okkum trygg, og vit royna at fáa sum mest burtur úr her, hóast ófriðurin higartil hevur oyðilagt nakað av ferðini hjá okkum. Vit vóna, at tað verður friðarligt aftur, so vit kunnu fara longur norður í landi at vitja fólk, sigur Ann-Britt.

**Vóna friður kemur í lag**

Familjan hjá Ann-Britt verður í Ísrael til síðst í november mánaði, og tey hava onga ætlan um at leita heimaftur til Danmarkar áðrenn ta tíð.

– Tað er sera keðiligt við hesum stríðinum, tí tað ávirkar fólk allastaðni. Fjølmiðlarnir gera nógv burtur úr, og tað eru nógvar eyka tíðindasendingar í sjónvarpinum, tí fólk mugu alla tíðina fáa boð um, hvat tað er sum hendir. Støðan er jú so hættislig, at nógv óttast, at veruligt kríggj skal bresta á, sigur Ann-Britt.

– Vit hava ikki merkt ófriðin beinleiðis, og vit hava tað gott her í Tel Aviv, men tað merkist allastaðni, at fólk kenna seg ótrygg við støðuna.



*Ann-Britt Schiller saman við børnunum, avmyndað í Sandágerði*

– Nú vóna vit bara, at friður kann koma í lag, so gerandisdagurin kann halda fram sum vanligt, og vit eisini sleppa at vitja familjuna har norðuri í landinum, sigur Ann-Britt Schiller Israeli.



Knæsokkar fra DIM
Tann breiði elastikkanturin forðar fyri merkjum á beinunum og ger at sokkurin passar perfekt
Fáast í tínum klædnahandli
DA FA Tel. 319591

Skorsteins-sóparin
er við til at halda umhvørvið reint
Jimex Brenniovnar
Isokern Skorsteinsbjálving
Isokern Skorsteinselementir
Lúkur - Fuglaristir
Ventilar - Roykhattar
Andrass á Krossbrekku
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass

bobcat -maskinurnar sum halda!
• Gravmaskinur –nógv model
• Lessarar við óteljandi møguleikum!
Vælegnaðar til byggivirkir, entrepenørar, bøndir, jarðarbrúk o.a.
Keyp góðsku – keyp Bob Cat!
Sosialurin - 311820
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Fáa tit ikki blaðið leygardagar?
Vinarliga ring tel. 214118, um tú sum haldari ikki fært leygardagssosialin. Boðar tú ikki frá innan kl. 15.00 leygardag, hava vit ikki møguleika fyri at bera leygardagsblaðið út.
Tíðindablaðið sosialurin

Føroya størsta úrval av
PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir
Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari
...sjálvandi til besta prísin!!
FARPACK
Staravegur 5, P.O. Box 3099
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com


The most beautiful DIM is you
Fáast í tínum klædnahandli
DA FA Tel. 319591

Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
BERGUR Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

JÄSPI KETLAR
Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu
Bæði dupultir og einkultir
Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.
- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum
MARIA POULSEN & CO
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

sosialurin
www.sosialurin.fo




# Fyrsta føroyska íløgufelagið stovnað

*Kaupthing Føroyar hevur, saman við Sparikassanum og øðrum, stovnað fyrsta serføroyska íløgufelagið. Eitt av endamálunum er at seta ferð á føroyska virðisbrævamarknaðin, tá hann kemur, men í fyrsta umfari verður hugt út um landoddarnar*



*Petur Holm*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyrsta serføroyska íløgufelagið er nú stovnað. Fyri kortum tók Kaupthing Føroyar stig til at seta á stovn Íløgufelagið Kaupthing Føroyar Invest, og tá reglugerðir og annað er góðkent einaferð í desember, verður farið ígongd við at selja íløguprógv.

Á tíðindafundi í hølunum hjá Kaupthing Føroyar í gjár, greiddi stjórin í Kaupthingi, Petur Holm frá íløgufelagnum, sum verður býtt í tvær deildir. Ein, sum skal gera íløgur í norðurlendsk partabrøv, meðan hin deildin skal gera íløgur í lánsbrøv í donskum krónum.

Hóast felagið er stovnað sum eitt føroyskt felag, so er tað kortini ikki meira føroyskt enn so, at felagið í fyrsta umfari hevur heimstað í Danmark. Lóggávan, sum skal verða grundarlag undir slíkum feløgum her á landi, er ikki lýst, og enn vita aktørarnir á fíggjarmarknaðinum einki um nær henda lóggáva verður sett í gildi. Tí er felagið stovnað eftir danskari lóggávu og við heimstaði í Danmark.

**Altjóða felag**

Í lóggávuni fyri slík feløg, stendur, at minstaupphædd fyri íløgum er 10 milliónir í hvørjari deild. Hóast tað sjáldan plagar at vera nakar trupulleiki at røkka hesi upphæddini, so er ikki óvanligt, at fáa ein peningastovn at seta trygt fyri, at upphæddin verður seld.

Hesari trygd er Sparikassin, sum eisini er samstarvsfelagið hjá Kaupthingi, komin við, og tað merkir, at verða bara átta milliónir seldar í íløguprógvum, so keypir Sparikassin tær seinastu báðar milliónirnar.

Tá hugt verður eftir, hvussu nógv stendur á bók í føroysku peningastovnunum, so skuldi ikki fari at verið nakar sum helst trupulleiki, at fingið fatur á teimum 20 milliónunum, sum í minsta lagi skulu í felagið.

Fyri at rudda allan slíkan iva burtur, er nevndin í felagnum manna við fólki frá altjóða deildum Kaupthings, sum á tann hátt, eisini fáa serligan áhuga fyri føroyska íløgufelagnum. Tí er heldur ikki óhugsandi, at útlendingar fara at keypa íløguprógv í »føroyska« íløgufelagnum, sum á tann hátt kemur at kappast við onnur íløgufeløg.

**Føroyski virðisbrævamarknaðurin**

Sum kunnugt hevur nógv verið tosað og skrivað um ein føroyskan virðisbrævamarknað. Hesin er á veg, men tað fer helst at taka nøkur ár, áðrenn hann fer at standa í fullum blóma. Á tíðindafundinum var ikki dult, at eitt av endamálum felagsins er, at virka á føroyska virðisbrævamarknaðinum fyri á tann hátt, at fáa gongd á eina menning av føroyskum vinnulívi.

Bæði Peter Holm, Wilhem Petersen og Marner Jacobsen vístu á týdningin fyri virðisbrævamarknaðin, at hava eitt slíkt íløgufelag, sum skal gera íløgur í føroysk feløg, sum einaferð koma á marknaðin.

Tað verður Kaupting Føroyar, sum skal hava raksturin av íløgunum hjá nýggja felagnum um hendi, um enn tað er nevnd felagsins, sum hevur Wilhem Petersen til formann, sum hevur ábyrgdina av felagnum.

Íløguprógvini vera at fáa til keyps í Kaupthingi og í Sparikassanum.





FM í virkisfótbólti 2000

Skipað verður fyri FM-kapping í virkisfótbólti í Gundadali leygardagin 28. oktober frá uml. kl. 11 til uml. kl. 18.

Reglur fyri kappingina
• Spælt verður á hálvum vølli
• 7 leikarar eru á hvørjum liði + 5 skiftisleikarar
• Flúgvandi útskiftingar
• Luttakandi leikarar mugu ikki hava spælt í 1., 2., 3. deild ella í steypakappingini hjá FSF ár 2000
• Virki hava loyvi til at lána í mesta lagi tveir leikarar frá øðrum virki
• Leikarar kunnu bert leika á einum liði
• Hvørt virki kann í mesta lagi luttaka við 2 liðum
• Seinasta freist at boða frá luttøku er týsdagin 24. okt.
• Í mesta lagi 40 lið kunnu luttaka
• Luttøkugjaldið er 500,- kr. pr. lið, og gjaldast skal á staðnum áðrenn spælt verður.
• Vinnandi liðið fær steyp til ognar og nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerki.
• Møguligur ágóði av kappingini fer til uttanlandsferð hjá B36-piltum og smágentum 2001

Í B36-húsinum verður møguleiki fyri umklæðing, høli til "officials" og viðhaldsfólk v.m.
Okkurt til matna og at sløkkja tostan við verður at fáa undir og eftir dystirnar.
Luttakandi lið skulu tekna seg til kappingina við at faxa lepan niðanfyri.

Send til: B36 • FM í Virkisfótbólti 2000 • telefax 31 80 36

Navn á liði/liðum:
Arbeiðspláss:
Kontaktfólk:
Tel: